# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## ALS – tørvur á broyting

Føroyar vóru sum kunnugt eitt hitt síðsta landið um okkara leiðir, ið fekk eina skipaða arbeiðsloysistrygging. Politiska mótstøðan móti eini lógásettari arbeiðsloysistrygging var sera stór, tí flokkar og politikkarar hildu, at ein arbeiðsloysistrygging, sum ein kendi hana frá okkara grannalondum, fór at gera meira skaða enn gagn. Hildið var, at hitt almenna átti at tryggja arbeiði við einum virknum búskaparpolitikki og við, at landið setti vinnuligar fyritøkur á stovn. Einasti møguleiki, tann vinnuleysi hevði, um hann ella hon stóð uttan arbeiði, var Almannastovan, men hesin útvegur kendist mangan trupul.

Hesin politiski hugburður fekk eitt skot fyri bógvin, tá tann stóra kreppan rakti Føroyar í nítiárunum. Undir hesi kreppu koma tað greitt til sjóndar, at táverandi skipan ikki megnaði at lofta teimum mongu, ið komu í trupulleikar av stóra vinnuloysinum. Fólk mistu hús og heim, og familjur í hópatali fluttu av landinum og búsettust uttanlanda, har samfelagið var meira framkomið enn tað samfelag, sum tey fóru frá.

Tað skuldi sostatt ein ræðulig kreppa til at lata upp eyguni á politikarum og fáa føroyska almenningin at skilja, at tíðin var búgvin til eina nútímans arbeiðsloysisskipan. Tað var frá byrjan eisini breið semja um, at henda skipan skuldi vera ein samhaldsføst tryggingarskipan, har allir løntakarar rindaðu og har allir løntakarar skuldu kunna fáa útgjald. Skipanin var sostatt ikki tann sama sum í okkara grannalondum, har løntakarar eru tryggjaðir í arbeiðsloysiskassum, ið eru knýttir at viðkomandi yrkisfeløgum. Valið av skipan var heppið, og tíðin, sum er liðin, síðan vit fingu ALS, hevur prógvað, at ALS hevur havt sera stóran týdning fyri føroyska løntakaran. Skipanin er alment viðurkend sum ein trygging, og fíggjarligur stuðul úr ALS er ein rættur, sum einhvør løntakari eigur. Hartil skal ikki undirmetast tann týdningur, ið ALS hevur havt til tess at tryggja, at okkara dugnaliga og vælútbúgvna arbeiðsmegi hevur støðast í landinum – eisini tá kreppur hava hótt.

Eingin skipan er lýtaleys, og árini hava víst ein vaksandi tørv á ábøtur á ALS skipanina. Flestøll munnu tí fegnast um, at stýrið fyri ALS eftir áheitan frá politisku myndugleikunum nú hevur endurskoðað skipanina. Niðurstøðan av hesi endurskoðan er eitt uppskot frá einum samdum stýri og ALS fyrisiting um nakrar stórar og sera týðandi broytingar og dagføringar. Úr rúgvuni av tilmælum kunnu vit nevna, at hámarkið fyri útgjaldsupphædd verður hækkað, at fiskimenn kunnu fáa stuðul, meðan skip liggur vegna umvæling, at skipanin fyri fólkið á fiskavirkjum verður broytt, at vinnurekandi sjálvboðin kunnu koma uppí skipanina o.m.a. Samantikið má ásannast, at tørvurin á hesum broytingum er stórur, at broytingarnar eru sera skilagóðar. Tað er tí bert at vóna, at uppskotið um nýskipan av ALS fær eina góða politiska lagnu.

**Sosialurin**

## Norðoya Heimavirki skjótt húsvilt

NICOLINA DAHL



Herfyri fingu vit, ið eru limir av Norðoya Heimavirki, bræv við innkalling til regluligan aðalfund í felagnum, settur at vera 21. apríl. Í brævinum kunnar nevndin limir felagsins um, at Heimavirkið er sagt upp úr hølunum, sum felagið hevur leigað frá Klaksvíkar kommunu hesi seinastu 27 árini, síðan tað varð sett á stovn. Av tí, at Heimavirkið hevur 1 ára uppsagnartíð, er uppsøgnin galdandi frá 1. januar 2011.

Mær var ógvuliga dátt við at lesa hetta og mátti fara at spyrja meg fyri, um hetta veruliga kundi vera satt?!

Sjálv havi eg fylgt arbeiðinum hjá Norðoya Heimavirki, síðan tað var sett á stovn fyri 27 árum síðan, og tað kemst av tí, at mamma mín var ein av teimum, sum var við til at stovna Heimavirkið og var í fyrstu nevndini. Eg havi verið limur har í mong ár og eri áhugað í, at Heimavirkið heldur fram.

Uppsøgnin av leigumálinum kemur sjáldandi sera illa við. Nógv orka er løgd í at fáa Heimavirkið at ganga og tað er ikki til at skilja, at kommunan nú vil toga grundarlagið undan tí, tá tað endiliga er eydnast at fáa Føroya størsta heimavirki so dánt at mala runt.

**Søgan**

Tað var um várið 1982, at Norðoya Heimavirki varð stovnað og við vælvild frá kommununi fekst innivist í gomlu handilshúsunum á Biskupsstøð, sum tá høvdu staðið tóm eina tíð. Tað kom væl við at fáa møguleika fyri at leiga so høglig høli, men tað kom eisini væl við hjá kommununi tá at fáa virksemi inn aftur í húsið. Hølini trongdu til ábøtur, men so við og við eru handilshølini sett í góðan stand. Øll hesi árini hevur Norðoya Heimavirki rímiligt goldið fyri ljós og hita umframt leigu, sum ásett var 1982. Endamálið við heimavirkinum er at varðveita ta gomlu mentanina við, at fólk, ið eru dugandi til hendurnar, skulu hava møguleika fyri ómakasleyst at sleppa av við tað, tey sita heima og virka. Felagið hevur meira enn 100 limir um allar Norðoyggjar og aðrastaðni við, sum trúliga hava sent tí vøru at selja fyri seg. Harumframt selur handilin troyggjur, føroyskt tógv og minnislutir til ferðafólk. Felagið rekur handilin og skipar eisini onkutíð fyri tiltøkum fyri limunum.

**Gomul mentan**

Tað má sigast, at Heimavirkið umboðar eina ta elstu mentan, vit eiga her á landi, tí líka so leingi sum fólk hava búleikast her, munnu tey hava tøtt og virkað klæði uppá kroppin. Tað er ein kvinnumentan burturav og kanska er tað tí, at so lítil virðing er fyri henni?

Vit, ið varða av Heimavirkinum, vita sum er, at noyðist tað at flyta í annað høli, so er stórur vandi fyri, at virksemið dettur niðurfyri. Tað krevur stóra orku at arbeiða handilin upp av nýggjum. Tað sóu vit eisini við Heimavirkinum í Havn, at tá tað varð húsvilt á Kongabrúnni, gekk ikki long tíð, til virksemið heilt helt uppat. Tað hevði verið stórt spell fyri Klaksvíkina, um handilin og felagið duttu niður fyri.

**Ferðavinna**

Kommunan leggur orku í at royna at fáa ferðamannaskip at leggja at í Klaksvík, men hvat hava vit at bjóða fremmandum ferðafólki? Norðoya Heimavirki hevur øll árini, síðan tað varð stovnað, tikið ímóti ferðafólki og hjálpt teimum til rættis – handilin hevur verið opin eisini uttan fyri vanliga handilstíð, tá ið ferðaleiðarar og kommunan hava biðið um tað. Nógvar, nógvar søgur eru um samskiftið við ferðafólkini, sum halda tað vera spennandi at vita, at ymisk fólk – ofta eldri konur – standa aftanfyri teir lutir, sum eru at keypa. Hetta er nakað tey ikki kenna í sama mun aðrastaðni og sum eigur at vera varðveitt. Og legg til merkis – hetta arbeiðið við ferðafólki hevur Heimavirkið sjálvandi gjørt uttan samsýning, sum ein part av vanligari handilsmentan.

**Hví?**

Tey siga fyri mær, at Heimavirkið er uppsagt, tí at Kunningarstovan vil gera brúk av hølunum. Har hevur altíð verið handil á Tingstøðini, men í bygninginum eru fleiri onnur høli, sum máttu kunna brúkst til virksemi hjá Kunningarstovuni, um so skuldi verið. Kanska geri eg Kunningarstovuni órætt at nevna hana, tí hetta er bara nakað, eg havi frætt, men ikki veit við vissu. Tað er undarligt, at tað skal bera til at siga einum leigara upp, tí ein heldur vil hava annan leigara inn! Og minst til, ein leigara, ið skal hava stuðul frá kommununi, meðan Norðoya Heimavirki betalir fyri seg. Heimavirkið hevur røkt sína skyldu mótvegis kommununi og hevur ikki uppiborið at vera soleiðis viðfarið. Fleiri høli standa tøk um allan býin í løtuni – hví skal tað so vera neyðugt at fara eftir einum høli, sum er í brúki? Tað kennist ikki sørt syrgiligt, at kommunan ikki sær virði í tí arbeiði, lagt er í Heimavirkið hesi 27 árini.

Meðan eg havi sitið og skrivað hesar reglur, havi eg rent meg fasta í ein spurning, sum er óskiljandi í hesum sambandi:

Hví? Hvat kann endamálið vera við at skerja og kanska beina fyri virkseminum hjá Norðoya Heimavirki? Tænir tað mentanini í býnum? Handilslívinum? Býráðnum? Eg finni einki svar og havi als ikki hugflog til at ímynda mær, at nakar kann bera agg til Heimavirkið - tað er so fullkomuliga ósannlíkt, at tað kann avgjørt ikki vera orsøkin!

Tí haldi eg, at niðurstøðan má vera, at hetta kemur av ókunnleika. Tað MÁ vera tí, at býráðslimirnir ikki eru fult kunnaðir! Tí fari eg at heita á býráðslimirnar og umsitingina: spyrjið tykkum fyri og hugsið tykkum um eina ferð aftrat!

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.